# Tónleikarar í langan Transit uttanlands

*Plátufelagið Tutl arbeiðir við at savna stuðul, so keypast kann ein Transit bussur, ið skal nýtast til tónleikaferðir uttanlands, nú ferðast kann sjóvegis alt árið*

DAGFINN OLSEN

Tutl hevur ætlanir um at útvega ein langan Ford Transit, ið skal nýtast til tónleikabuss.

Nú ferðast kann í útlond sjóvegis alt árið, liggur raðið fyri hjá tónleikarum at ferðast á henda hátt og bíligari er eisini at flyta ljóðfør á henda hátt.

Tutl er farið at søkja stuðul til bussin, ið limir í Tutl ætlandi fáa gagn av, tá ferðir verða í útlond at leika.

Stórt koyrikort skal ikki nýtast til bussin.

Bussurin skal prýðast við lýsingum og verður sostatt ein rullandi lýsingarbreddi, ið eisini boðar frá, hvaðani bussurin er.

# Íslendsk kvintett – føroyskir tónar

*Reykjavíkar Wind Quintet hevur spælt inn á fløgu tónaverk hjá føroyskum tónasmiðum*

DAGFINN OLSEN

Tað er einki minni enn stórhending, at føroysk klassisk verk nú koma út á fløguni Cantus Borealis. Fløgan verður givin út á forlagnum BIS, sum er norðurlendskt útgávufelag. Við hesum verður tónleikurin breiddur um allan heim.

Reykjavíkar Wind Quintet, ella Blásarakvintett Reykjavíkar, hevur seinnu árini samstarvað við føroysk tónaskøld og luttikið á Summartónum nakrar ferðir.

Tað eru verk frá hesum framførslum, sum nú koma á fløgu.

Í felagnum Føroysk Tónaskøld eru tey fegin um samstarvið, tí íslendska kvintettin verður mett a verða á sera høgum listarligum støði.

Tað hevur týdning, at føroysk tónaskøld fáa tónleik sín spældan inn á fløgu, so hann kann spælast á útvarpsstøðum kring heimin, meta tey í Føroysk Tónaskøld.

Áhugin fyri føroyskum tónleiki er vaksandi og føroysk verk verða framførd aðrastaðni á konsertum og tónleikafagnaðum.

Tónasmiðirnir, ið eru umboðaðir á fløguni eru, Atli Petersen, Edvard Nyholm Debess, Kári Bæk, Kristian Blak, Pauli í Sandagerði og Sunleif Rasmussen.

Áhugavert er, at í fløguhúsanum er greitt frá um tónskøld og um Føroyar á fleiri málum.




# Várframsýningin 2000

*Leygardagin letur árliga várframsýningin upp. Hetta er 11. várframsýningin, ið Føroysk Myndlistafólk skipa fyri*

DAGFINN OLSEN

Klokkan 16 leygardagin letur Várframsýningin 2000 upp í Listaskálanum. Sum vanligt, er tónleikur afturvið og á kvøldi klokkan 19 er várkonsertin, har Aldubáran framførir nútímans føroysk verk.

Felagsskapurin Føroysk Myndlistafólk skipar fyri Várframsýnigini og hetta er tann 11. í røðini.

Hetta er úrvalsframsýning. 36 fólk sendu verk inn. 13 fingu einki við og 23 eru umboðað á sýnigini við í alt 69 verkum.

Í úttøkunevndini í ár hava sitið Tita Vinther, Astrid Andreasen og Guðrið Poulsen.

Tær meta, at sýningin er ikki so stór í ár, sum hon onkutíð hevur verið, men hetta kemst partvís av, at ikki so mong sendu inn.

Ein er við fyri fyrstuferð, og fleiri listafólk í yngra ættarliðnum eru umboðað.

Mest eru tað málningar, ið eru við, men eisini annað, t.d. fotomyndir. Eisini er meira av skulpturum, enn tað hevur verið.

Tær halda, at listin í Føroyum er ikki so eksperimenterandi, sum ein sær aðrastaðni. Onkur hevur kanska latið okkurt inn, men tað skal eisini vera gott, tí tað er ikki nokk at provokera, bert fyri at provokera.

Spurdar um, hvat eitt gott verk er, siga tær, at fyrst og fremst skal kompositiónin vera í lagið. Er talan t.d. um eina myndarøð, so skulu einstøku myndirnar eisini kunna standa fyri seg.

Verkið skal vera upprunaligt og helst nýskapandi.

Tær 3 í úttøkunevndini hava tosað og kjakað seg fram til úrslitið, so gongdin hevur verið demokratisk, meta tær. Tær hava eisini lagt dent á, at sýningin í sær sjálvum skal vera eitt listaverk, ein heild, ið hongur saman.

Tí hava tær her havt tann trupulleika, at veggirnir í Listaskálanum eru upptiknir, so tær sleppa ikki at heingja upp, fyrr enn fríggjadagin, so tað kann vera trupult at skapa sær eina heildarmynd av sýningini.

Tær meta, at nógv gott er við í ár og eru t.d. spentar uppá unglingin, sum er við fyri fyrstuferð. Hetta er Jens L. Thomsen. Hann er 20 ára gamal og hevur áður luttikið á ólavsøkuframsýning,

Vanligt er, at ein úr úttøkunevndini myndprýðir myndskránna. Í ár prýðir eitt teppi hjá Titu Vinther myndskránna.

23 fólk sýna fram á Várframsýnigini og býtið millum kynini er so, at 17 mannfólk eru við og 6 konufólk.

Elsti luttakarin er føddur í 1936 og tann yngsti í 1980.



*Guðrið Poulsen, Tita Vinther og Astrid Andreasen hava í ár sitið í úttøkunevndini, ið hevur lagt Várframsýnigina tilrættis*
**Mynd: Álvur Haraldsen**

# Várkonsert

*Sum vanligt, so verður tónleikur at hoyra í samband við várframsýningina. Men í ár var nær við, at várkonsertin ikki gjørdist veruleiki*

DAGFINN OLSEN

Vanligt er at hava konsert í samband við Várframsýningina, har føroysk verk eru á skránni og ofta verða frumframførd.

Aldubáran spælir, tá Várframsýningin letur upp verk eftir Palla Hansen og Sunleif Rasmussen Verkið Dropar hjá Palla verður frumframført.

Á kvøldi er Várkonsertin. Tá er verkið Skýrák eftir Atla K. Petersen á skránni. Verkið er bílagt til konsertina.

Fyrsta almenna framførslan av Nocturne fyri B-menniskju eftir Trónd Bogason er eisini á skránni, eins og verk eftir Paula í Sandagerði, Sunleif Rasmussen og Palla Hansen.

**Læna flygul**

Orsakað av, at klaverið, sum hevur staðið í Listaskálanum, av ymsum orsøkum ikki er har longur, gjørdist konsertin í ár nærum av ongum.

Tað eydnaðist tó at læna flygul frá Stamen Stantchev. Hetta skuldi tó flytast úr Kommunuskúlanum og niðan í Listaskálan. Eydnan var við og fýra sterkir menn komu til hjálpar, so Várkonsertin verður sum ætlað.

# Semingsmenn stýra nú samráðingunum

*Semingsmenninir Rúni Heinesen og Allan Skaalum hava longt sáttmálan millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í eina viku*

DAGFINN OLSEN

Semingsmenn eru komnir upp í sáttmálasamráðingarnar millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Semingsmenn eru Rúni Heinesen, stjóri á Tekniska Skúla í Klaksvík og Allan Skaalum, stjóri á Repro-Z.

Týskvøldið høvdu semingsmenninir fund við partarnar, har teir hoyrdu sjónarmið teirra.

Semingsmenninir hava avgjørt at leingja sáttmálan millum partarnar í eina viku. Harvið er arbeiðssteðgurin og blokadan, sum Føroya Lærarafelag lýsti at byrja 1. mars, útsett í eina viku.

Ætlandi skulu partarnir hittast aftur til fundar fríggjamorgunin.

Umframt lønarspurningin, so er tað serliga arbeiðstíðin, ið skilir partarnar.

Eisini nýggja fólkaskúlalógin hevur verið partur av kjakinum og serliga tær eyka útreiðslur, ið standast av, um hon skal fylgjast.



Uni Danielsen, stjóri á Flogfelag Føroya:

# – Eitt sera skilagott val

*– Eg eri sera væl nøgdur við, at Heri Niclasen er settur sum stjóri á Ferðaráðnum og haldi, at tað er eitt skilagott væl, sum Landsstýrismaðurin hevur gjørt, sigur Uni Danielsen, sum er stjóri á Flogfelag Føroya, sum bæði selur ferðaseðlar og rekur gistingarhús*

SVEINUR TRÓNDARSON

Fyrst í næsta mánað tekur nýggi stjórin í Ferðaráð Føroya, Heri Niclasen við starvinum.

Tað er eingin loyna, at tá tað frættist, at Heri Niclasen hevði søkt starvið var hann favorittur at fáa starvið, og serliga í vinnuni var eitt greitt ynski um at hann skuldi setast.

Nú er tað hent og í tí sambandi hava vit fingið eitt prát við stjóran á Flogfelag Føroya, sum umframt at selja ferðaseðlar til og úr Føroyum eisini tekst við gistingarhúsvirksemi.

Og tað skilst á øllum brøgdum, at Uni Danielsen er framúr væl nøgdur við valið hjá stýrinum fyri Ferðaráðið og at landsstýrismaðurin valdi at fylgja innstillingini.

**Kompetentur maður**

– Í mínari verð er eingin ivi um, at vit hava fingið ein sera kompetentan mann, sum stjóra á tann týdningarmesta postin í føroysku ferðavinnuni. Hann hevur drúgvar praktiskar royndir úr júst ferðavinnuni, og tað fer avgjørt at koma honum til góðar, sigur Uni.

Hann heldur, at tað er ein avgjørdur fyrimunur, at Heri kemur úr einum starvi har hann hevur verið noyddur at leggja dent á tann handilsliga partin.

– Tað er jú tað ferðavinnan livir av. Fáa vit ikki nóg mikið av peningi í kassan, so hongur ikki saman. Tað er bara so, sigur Uni Danielsen, sum leggur afturat, at tað hesin parturin alt ov ofta er skúgvaður til viks, tá ferðavinnan fyrr hevur verið viðgjørd.

**Gerast spennandi og lokkandi**

Sum við øllum øðrum vørum, sum vera settar til sølu, so er ferðavinna eisini ein vøra, sum verður mett eftir dygd og góðsku.

Hetta legði Heri sjálvur dent á í blaðnum í gjár, og hann vísti á týdningin at gera eina góðskingarskipan í gásareygum. Við tað meinti hann, at tað hevði verið gott at kunna samansjóða øll tey ymsu útboðini kring landi soleiðis, at teir, sum gera faldarar og príslistar vita, hvat liggur í teimum ymsu túrunum. Á tann hátt heldur Heri, at túrarnir vera »góðskustemplaðir« og á tann hátt vita teir, sum velja túrar, hvat tað er teir keypa.

Hesum er Uni Danielsen púra samdur í. Hansara fatan er, at vit hava gloymt, at vinnan er ein søluvøra, sum skal gerast lokkandi fyri tey ferðandi, sum hava eina øgiliga rúgvu av tilboðum at velja ímillum.

– Vit mugu gera tilboðini lokkandi, soleiðis at tey koma hendavegin. Í okkara føri ber ikki til bara at biða fólk koma vestur í Vágar at sova. Tað tíma tey ikki. Men gera vit túrar og annað, so er ikki óhugsandi, at vit kunnu draga fólk til. Annars koma tey ikki, sigur Uni Danielsen.

**Størri fjølbroytni**

Eitt annað, sum Uni Danielsen, eftir øllum at døma hevur saknað er fjølbroytni.

Hansara fatan er, at føroyingar eiga at vera nógv meira úti um seg enn bara at velja nøkur ferðafólk út og siga: Tykkum vilja vit hava til Føroya, tí tað vísir seg, at talið av ferðandi í Føroyum er ikki so stórt, sum vit hava gingið og hildið.

– Heri vísir á netið hjá Atlantsflog, Icelandair og Mærsk og eg kann leggja afturat tað arbeiði, sum umboðsstovurnar hjá Mærsk gera fyri føroyingar. Fyri tey eru Føroyar eitt »eksotiskt« stað og tey eru glað fyri at hava Føroyar við í teirra netið, sigur Uni, sum heldur, at hugskotið um størri fjølbroytni er skilagott og rætti vegurin at fara.

**Maður fyri samstarvi**

Tað, sum er gjøgnumgangandi í samrøðuni við Una er, at hann fegnast um at hava fingið ein stjóra á Ferðaráðnum, sum hevur drúgvar royndir úr ferðavinnuni og sum frammanundan hevur samstarva við flestu føroyingar, sum takast við ferðavinnu.

– Tað er so avgjørt hansara sterka síða, tí hóast hann hevur sínar heilt greiðu og avgjørdu meiningar, so dugir hann væl at samskifta og samstarva við fólk. Hann hevur eitt stórt net úti í heimi, sum kann fara at vísa seg at vera ein sera stórur fyrimunur fyri føroysku ferðavinnuna, sigur Uni Danielsen at enda.



*– Vit kunnu ikki bara biða ferðafólk koma hendavegin, tí vit skulu eisini hava okkurt at bjóða teimum. Og tað skal eisini vera annað enn gistingarmøguleikar sigur Uni Danielsen (innsett mynd). Hann gleðist yvir at Heri Niclasen er settur í starv sum stjóri í Ferðaráð Føroya, tí hann kennir vinnuna innanífrá*
**savnsmynd**

# Lítið virksemi á Skála í løtuni

*Eftir at hava havt úr at gera eina tíð, er meira friðarligt á Skipasmiðjuni á Skála í løtuni. – Vit hava gjørt burtur av okkum, sigur stjórin Jón Danielsen*

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað gongur meira stillisliga fyri seg á Skipasmiðjuni á Skála í løtuni.

Teir hava havt úr at gera, men nú er meira friðarligt, sigur Jón Danielsen, stjóri.

– Kiliutaq hevur verið her í ein mánað, men hann fór avstað leygardagin. Síðani hevur Jupiter verið í dokk, men tað var bara ein heilt lítil umvæling. Hann fór avstað aftur beinanvegin.

Annars hava bæði Sepia og Føroyingur verði á sleipistøð á Skála. Bæði skipini eru farin úr føroyska flotanum, tí tey eru seld grønlendingum.

Royal Greenland hevur keypt bæði skipini til krabbaveiðu og í tí sambandi skuldu onkrar klassaumvælingar gerast áðrenn grønlendingar yvirtóku skipini, greiðir Jón Danielsen frá.

Skipini kunnu ikki brúkast til krabbaveiði sum er, og tí skulu onkrar broytingar gerast umborð.

Útlit eru til, at Skipasmiðjan á Skála fær uppgávuna, tí inspektørurin hjá Royal Greenland, sum hevur verið í Føroyum í sambandi við Kiliutaq, er sera væl nøgdur við tað avrikið.

Kortini vil stjórin Jón Danielsen hvørki váttað ella avsannað tíðindini um, at Skipasmiðjan á Skála hevur fingið umvælingarordran eisini

Stjórnarskrivstovan

Journalfólk

Stjórnarskrivstovan er ein stápur undir stjóranum, sum í fyrsta lagi skal vera leðsluni til hjálpar, men eisini hevur hon fleiri umsitingarligar uppgávur fyri alla fyritøkuna.

Menningin og broytingar seinnu árini hava havt við sær, at virksemið á Stjórnarskrivstovuni er munandi økt og broytt. Journalarbeiðið er ein partur, sum dentur verður lagdur á at menna; í farna ári varð elektronisk journalskipan tikin í nýtslu, og arbeitt verður nú við at knýta allar málsviðgerar í skipanina. Tí er avgjørt at seta eitt fólk í starv, hvørs starvsøki verður postur, journal, skjalagoymsla, skráseting og annað, sum hoyrir til.

Krøv til umsøkjarar:
- Góður kunnleiki til og arbeiðsroyndir við journalarbeiði
- Teldukunnleiki á brúkarastigi
- Góður málkunnleiki
- Almenn vitan
- At vera røkin og nærlagdur
- Neyðugt er at duga at arbeiða sjálvstøðugt og at hava yvirlit yvir fleiri mál um somu tíð

Viðkomandi fer at hava samskifti og samstarv við starvsfólk í øllum deildum í fyritøkuni, og tí er neyðugt at
- vera fyrikomandi
- hava góð samstarvsevnir
- vera tolin
- duga at lurta og málbera seg

Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Honnu Simonsen ella Onnu Dahl-Olsen á tlf. 303030.

Umsóknir skulu vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 17. mars 2000, og skulu sendast til

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697

SANSIR · TEL 355 355